# Hevndi seg inn á fimm bilar

**Ein 21 ára gamal maður varð sunnunáttina handtikin av løgregluni fyri at hava gjørt seg inn fimm bilar í J. Nolsøesgøtu í Havn. Hann játtaði seg sekan**

HERVERK
*Snorri Brend*

**Havn:** Kl. 02:48 sunnunáttina fekk løgreglan eina uppringing frá einum íbúgva í J. Nolsøesgøtu.

Viðkomandi segði seg hava afturhildið einum ungum manni, sum hevði gjørt seg inn á bil hansara. Hann hevði m.a. brotið eitt av speglunum á bilinum.

Løgreglan kom á staðið og tók sær av manninum, sum játtaði at hava gjørt seg inn á henda bilin – og fýra aðrar bilar í somu gøtu!

Bilarnir stóðu allir parkeraðir framvið vegnum, og líkt er til, at ungi maðurin hevur tikið teir ein fyri ein og hevur gjørt seg inn á m.a. speglini á hesum bilunum.

Enn veit løgreglan ikki orsøkina til hesar gerðirnar hjá unga manninum. Annars hevur talan verið um eitt friðarligt vikuskifti í høvuðsstaðnum.



*Spegl og bilar høvdu fingið skaða av herverkinum*

# - Við gykli verður pappír til pengar

**Allan henda mánaðin hevur Nósi hátíðarhildið føðingardag sín. Leygardagin vitjaðu teir í Havn og sunnudagin endaði føðingardagshaldið í Suðuroy**

FØÐINGARDAGUR
*Snorri Brend*

**Havn:** Tey sótu øll sum á nálum, meðan Nikliái á Neystalofti bilsin sá, hvussu ein rættur gyklari arbeiðir.

Staðið var Badmintonhøllin í Havn, har Nósi helt sín føðingardag fyri børnum í Suðurstreymoy. Saman við Nikláa vóru tveir av vinmonnum hansara – gyklarin Ásbjørn Berthelsen og búktalarin Absalon Áargarð.

Í hondini hevði Ásbjørn ein blokk við pappírum. Hann spurdi Nikláa, hvat hetta var – og løtu seinni var hesin blokkurin vorðin til 50 kr. seðlar.

Spurningurin var, hvat hann so skuldi nýta sína pengar til?

- Teir ætli eg mær at brúka, var Nikláí skjótur at svara.

Men hann fekk svar uppá tiltalu, tí pengarnar teir setur ein í bankan – Føroya Banka, undirforstaðið.

Hetta showið var ein partur av føðingardegshaldinum í Havn, har í hóptatali av børnum og vaksnum høvdu leitað sær.

Showið varð fyrst framført á middegi og aftur seinnapartin, fyri at øll skuldu fáa ríkiligt at plássi og fáa alt við.

Á hvørjum staði hava børnini eisini havt møguleika at senda inn tekningar. Og á øllum støðum hevur ein so kosið vinnarar fyri bestu tekningina.



*Børnini hugnaðu sær saman við Nósa í Badmintonhøllini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 37, 2005
www.kaupthing.fo

# Misjøvn búskapartekin

MARKNAÐARRÁK

Farna vika var full av kunngerðum, sum hava týdning fyri evru/dollarakursin. Og nógvu kunngerðirnar vístu ikki nakra eintýdda mynd av, hvønn veg kursurin skal. Hallið á handils-og gjaldsjavnanum minkaðu, meðan smásølan frároknað bilar, og útlendskt keyp av amerikonskum virðisbrøvum vuksu meir enn væntað. Hesi viðurskifti styrkja dollaran, tí tey benda á ein vaksandi búskap sum hevur lætt við at draga útlendska fígging til sín. Í Evropa var prísvøksturin kunngjørdur. Frároknað olju og mat var hann bert hækkaður 1,3% seinasta árið. Tað bendir á, at evropiski miðbankin heldur stuttu rentuna í frið, og er tí við til at fáa evruna at vikna í mun til dollaran. Hinvegin lækkaðu amerikonsku álitistølini nógv meir enn væntað. Álitistøl verða nýtt sum meting av gongdini í búskapinum, og um hesi hava rætt, sær minni gott út í USA. Úrslitið var, at evran viknaði frá 1,24 til 1,22 dollarar fyri hvørja.

### Lánsbrøv enn uttan rák

10-ára danska lánsbrævarentan helt sær millum 3,00%-3,10% í farnu viku. Sostatt er ikki rættiligt rák komið á lánsbrævamarknaðinum enn. Tað førir við sær, at nøkur realkredittlánsbrøv geva gott avkast, tí hesi geva hægri rentu enn statslánsbrøv, meðan kursurin harafturímóti ikki flytir seg eins nógv.

### Partabrøv kunnu hækka meira

Álitistølini úr USA ávirkaðu ikki partabrøvini fríggjadagin. Hinvegin hækkaðu partabrøvini sum heild orsakað av, at oljan lækkaði munandi og tí at Bush kunngjørdi, at býirnir, ið vóru raktir at ódnini Katrinum skulu endurbyggjast. Hetta førdi við sær optimismu og boðar sum heild frá øktum virksemi.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna fara fíggjarmarknaðirnir at seta sjóneykuna á amerikanska tjóðbankan, Fed. Bankin fer væntandi at hækka stuttu rentuna til 3,75%, og tað mest áhugaverda við tí verður sum vant tíðindaskrivið, sum verður kunngjørt í tí sambandi. Fer Fed at geva ábendingar um, at áhaldandi rentuhækkingarnar seinasta árið eru við at enda? Um so er, er tað gott fyri bæði láns- og partabrøv.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 609,55 | 1,5% | ↑ |
| JPY | 5,47 | -0,1% | ↓ |
| GBP | 1.102,10 | -0,2% | ↓ |
| NOK | 95,73 | 0,0% | → |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,85 | -0,2% | ↓ |
| Evru Lánsbrøv | 176,38 | -0,3% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 101,44 | 1,4% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 67,38 | 0,9% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*